# Einki stig á Vágseiði

Toppdysturin í næstbestu fótbóltsdeildini á Vágseiði millum VB/Sumba og 07 Vestur varð ikki liðugt spældur í gjár. Veðrið var vánaligt, men kortini brílslaði Petur Reinert fyrstu ferð klokkan 14.30 soleiðis, sum FSF hevði fráboðað, at tað skuldi gerast. Tá ið hálvur tími var farin ásannaðu dómarin og liðini bæði, at tað ikki bar til at spæla fótbólt, og so varð bríkslað fyri síðstu ferð. Tað er ikki greitt, nær dysturin fer at verða spældur.



# Høvdu ikki tað seinasta

Hjálparvenjarin hjá Eysturríki, Andreas Herzog, var heldur speiskur, tá hann gjørdi viðmerkingar til fjølmiðlarnar. – Hetta var nú ikki nakað veruligt hæddarpunkt fyri okkum – at vit bert fingu eitt stig móti Litava og Føroyum. Framúr avrikið móti Fraklandi er gloymt, og vit hava mist góðu støðuna í bóltinum. Tú mást leggja teg á odda móti einum slíkum mótstøðuliði, og um tú ikki skorar, so mást tú ikki gerast bilsin, tá hinir gera tað. Teir skora beint eftir steðgin, og vit høvdu neyðuga hepnið til at javna alt fyri eitt, men eftir tað høvdu vit ikki seinastu orkuna til at avgera dystin. Tað er sjálvandi eitt vónbrot fyri okkum, og vinnur tú ikki á Litava ella Føroyum, skalt tú ikki halda teg hava ein møguleika móti Serbia ella Fraklandi, segði Herzog.

# Beinini vóru moyr

**Hóast beinini vóru moyr longu undan dystinum, so gloymdi Christian Lamhuage Holst veruleikan leygardagin. Og saman við liðfeløgunum er hann til reiðar at toga enn eitt gott úrslit heim mikukvøldið**



*Hann plagar ikki at vera tann, sum setir seg sjálvan í fokus, men leygardagin mátti Christian Holst bara flenna, tá hann skuldi staðfesta, at hann enn ikki veruliga var í nóg góðari venjing til altjóða fótbólt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt av føroysku ivamálunum undan dystinum var, um dystarvenjingin hjá Christiani Holst Lamhauge var nóg góð, nú hann bert hevði spælt gott og væl tveir dystir, síðani hann kom fyri seg eftir skaða.

Avrikið á vøllinum tosaði fyri seg, men kortini staðfesti Holst eftir dystin, at formurin kanska ikki var heilt so góður, sum hann eigur at vera.

- Tað er kanska láturligt hjá mær júst nú at siga, at eg ikki eri í form. Men beinini hjá vóru moyr longu undan dystinum, og tað eru tey í so nógv størri mun nú. Men tað er slíkt, sum tú gloymir viðhvørt, og í dag gloymdi eg tað eitt sindur, segði Christian Lamhauge Holst eftir dystin.

Moyrur ella ikki, so rann og tacklaði Christian seg enn longur inn í føroysku fótbóltshjørtuni, men hetta var nú ikki nakað, sum hann hevði so øgiligan hug at nema við sjálvur.

- Nærdystir veit eg ikki. Tað er ikki tað, sum eg geri mest við. Men eg hevði bóltin rættiliga nógv, og so noyðist mann jú eisini at renna. Sjálvur havi eg tað í øllum førum soleiðis, at eg vil helst renna, tá vit hava bóltin.

Hetta var ein dystur, har tit megnaðu at skapa tykkum pláss og tíð til at seta nøkur kontra-álop ígongd. Kendu tit alt fyri eitt á tykkum, at hetta var ein dystur, har tit kundu skapa eitt úrslit?

- Fyrstu løtuna haldi eg, at vit eru darvaðir av nógva vindinum. Og eg veit ikki, um vit hava nakað álop fyrstu 10 minuttirnar. Men vit fáa fatur á rætta endanum, og so fáa vit brádliga nøkur góð álop. Tað er jú tað, sum vit altíð royna, og tað eydnaðist so í dag.

Hetta er fyrsta stigið, sum tú hevur verið við til at spæla heim til Føroya. Er tað ein lætti at fáa staðfest, at dystirnir eisini kunnu koppa okkara veg av og á?

- Sjálvandi. Tað er altíð ein góð kensla at skapa nakað óvæntað, og tað er fantastiskt. Vit hava jú verið nær við nakrar ferðir. Vit vita eisini, at vit skulu hava eitt sindur av hepni við okkum, og tað høvdu vit í dag. Teir hava nokk fleiri møguleikar enn vit, og Jákup stendur ein frálíkan dyst. Og so kláraðu vit onkursvegna at toga tað heim hesaferð.

Og eru tit til reiðar at gera eitt nýtt hál um fýra dagar?

- Tað royna vit í øllum førum av øllum alvi, segði Christian Lamhauge Holst leygardagin.

# Ingi og Jann Ingi á landsliðið

**Jógvan Martin Olsen hevur um vikuskiftið boðsent tveimum nýggjum spælarum**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hvørki Jákup á Borg ella Mikkjal Thomassen eru tøkir hjá landsliðsvenjaranum til dystin mikukvøldið. Teir noyddust báðir skaddir av vøllinum, og í báðum førum varð staðfest, at tað verður vónleyst at fáa teir spæliklárar til mikudagin.

Tí gjørdist neyðugt hjá Jógvan Martini Olsen at boðsenda nýggjum monnum, og er valið her follið á Jann Inga Petersen úr B68 og Inga Højsted úr B36.

Teir báðir hava áður verið í landsliðsmyndini. Jann Ingi var fyri fimm-seks árum síðani mest sum fastur partur av landsliðshópinum, men tað støðuna hevur hann ikki havt nú í eini fýra ár.

Ingi Højsted var ein av spælarunum, sum Jógvan Martin Olsen ætlaði at byggja nýggja landsliðsættarliðið um, men drúgvir skaðasteðgir hava borið við sær, at hann ongan tíð hevur vunnið seg inn á ætlaða sentrala leiklutin.

Seinastu tveir mánaðirnar hevur Ingi tó verið fastur partur av liðnum hjá B36, og avrikini hava her verið somikið góð, at hann nú er kallaður aftur í landsliðshitan.

